## Laudrup venja Getafe

Slaturin hevur leingi gingið um, at Michael Laudrup skuldi gerast nýggjur venjari í lítla spanska høvuðsstaðarfelagnum, Getafe, og nú er hetta skiftið endaliga komið uppá pláss. Eftir at Real Madrid beint fyri døgurða í gjár kunngjørdi, at teir høvdu sett Bernd Schuster, nú fyrrverandi Getafe-venjara, sum venjara í stórfelagnum, gingu bert fáir minuttir, áðrenn Getafe kunngjørdi teirra nýggja venjara. Ikki so óvæntað var talan um danan, Michael Laudrup, sum sostatt vendir aftur til Spania, har hann hevði sínar bestu dagar sum yrkisleiakri í stórfeløgunum Barcelona og Real Madrid.



## Heimsmeistari til Lyon

Franska meistaraliðið, Lyon, hevur júst gjørt avtalu við ein av leikarunum, sum fyri einum ári síðani var við til at tryggja Italiu heimsmeistaraheitið. Talan er um vinstra bakkin Fabio Grosso, sum hevur skrivað undir fýra ára sáttmála við Lyon. Grosso kemur til Lyon frá italska Inter, og hann hevur leikt 25 landsdystir fyri Italia.

# Góður dagur hjá Síl

**Fjarðastevnan gjørdist sera góð hjá Sílinum, sum vann róðurin hjá bæði 5-mannaførum við dreingjum og 5-mannaførum við kvinnum. Hjá kvinnunum er Sílið bert fimm stig frá meistaraheitinum**

KAPPRÓÐUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Eitt av 5-mannaførunum hjá Havnar Rórðarfelag, Sílið, fekk eina dreyma byrjan uppá róðrarkappingarárið, tá bæði dreingirnir og kvinnurnar umborð megnaðu at vinna sín róður á fyrstu stevnuni á árinum, Norðoyastevnu. Við hesum var grundin løgd fyri einum góðum kappingarári hjá bæði dreingjunum og kvinnunum umborð á Sílinum.

Komandi róðrarnir miseydnaðust tó eitt sindur hjá Sílinum. Hjá dreingjunum var tað brádliga Havfrúgvin sum setti dagsskránna við sigrum í trimum teimum næstu róðrunum, meðan kvinnurnar hvørki megnaðu at vinna á Sundalagsstevnu ei heldur á Jóansøku.

Við hesum var brádliga stórur munur í FM-kappingini hjá dreingjunum, har Havfrúgvin nú var væl framman fyri Sílið, meðan kappingin hjá 5-mannaførum við kvinnum tóktist púra opin. Sílið var enn á odda undan fjórða róðrinum, men bæði Ørnin, Frúgvin og Fípan Fagra vóru beint í hølunum á teimum.

### Vend kom í á Varmakeldu

Fjórða róðurin á árinum, sum var á Varmakeldu í Fuglafirði, kom tó vend í hjá kvinnunum. Nú bragdaði aftur hjá Sílinum, og tær lótu ongan iva vera um, hvør var sterkasti báturin henda dagin. Tær endaðu meir enn eina bátslongd framman fyri Ørnina, meðan Fípan Fagra og Frúgvin endaðu á næstu plássunum.

Hjá dreingjunum gekst tó enn niður á bakka. Eftir sigurin á Norðoyastevnu vóru teir blivnir nummar tvey bæði á Sundalagsstevnu og á Jóansøku aftanfyri Havfrúnna, men á Varmekelda megnaði Junkarin eisini at fara fram við Sílinum, so hesa ferð máttu teir taka til takkar við bronsu heiðursmerkjunum.

Um tað er sigurin hjá kvinnunum, sum eisini hevði fingið gongd á dreingirnar til komandi stevnuna, sum var Fjarðastevnan á Strondum farna leygardag, skal vera ósagt. Tað er tó ein sannroynd, at úrslitini hjá Sílinum gjørdust enn betri á Fjarðastevnuni. Her løgdu dreingirnar lunnar undir ein fantastiskan dag, tá teir vunnu allar fyrsta róðurin heilar tvær bátslongdir framman fyri Havfrúnna.

Løtu seinni fylgdu kvinnurnar í teirra fótafetum við enn einum tryggum sigri framman fyri Fípuna Føgru, og sostatt var leygardagurin hjá Sílinum at kalla fullkomin inni á Strondum. Tveir sigrar í tveimum róðrum.

### Gera eina roynd at vinna FM

Bátsformaðurin hjá dreingjunum umborð á Sílinum, Róar Dalsgaard, gleddist sum vera man um sigurin á Fjarðastevnu.

- Hetta følist rættiliga gott. Tað er deiligt at vinna aftur. Vit taka tó einki fyri givið komandi róðrarnar, tí vit hava respekt fyri Havfrúnni til næstu stevnu. Teir hava eina góða manning og hava fingið góð úrslit, men vit fara at gera alt fyri einum at vinna komandi leygardag, sigur Róar.

Hann dylur heldur ikki fyri, hvat málið hjá dreingjunum umborð á Sílinum er.

- Málið hjá okkum er at vinna FM. Tað hevur tað alla tíðina verið. Hetta verður tó ringt, tí vit eru fýra stig aftan fyri Havfrúnna í FM-stríðnum, og teir hava eina góða manning. Vit mugu tó vinna síðstu tveir róðrarnar. Gera vit hetta, so vinna vit eisini meistaraheitið, sigur ungi bátsformaðurin á Sílinum.




### Luktar av gulli

Aftan á tveir heldur keðiligar róðrar, har tað ikki gekk heilt eftir vild hjá kvinnunum umborð á Sílinum, hevur tó gingið nógv betur síðstu tveir róðrarnar. Bátsformaðurin hjá teimum, Anna Høgnesen, heldur tó ikki, at tær hava broytt nakað serligt.

- Vit hava ikki endiliga broytt nakað eftir róðrarnar á Sundalagsstevnu og Jóansøku, og vit hava heldur ikki gjørt nakað øðrvísi. Tað hevur gingið væl hjá okkum í venjing, og vit hava vant hart alt árið, og hetta haldi eg hevur givið úrslit, sigur Anna.

Gongdin hjá Sílinum hevur eisini gjørt tað, at tær nú liggja sera væl fyri í FM-stríðnum, og Anna dylur ikki fyri, at tær ætla at avgera meistaraheitið á Vestanstevnu.

- Tað byrjar heilt víst at lukta av gulli. Tað er ikki komið í hús enn, men vit ætla at avgera meistaraheitið

# Formaðurin gleðist um sigrarnar

**Óli Svein Hansen, formaður í Havnar Róðrarfelag, fegnast um úrslitini hjá dreingjunum og kvinnunum umborð á Sílinum. – Tað er gott, at tey ungu vísa vegin, sigur hann**

KAPPRÓÐUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Farna leygardag var fimti FM-róðurin á skránni, tá 42 bátsmanningur tókust á Fjarðastevnuni á Strondum. Hjá bæði 5-mannaførum við dreingum og 5-mannaførum við kvinnum megnaði Sílið úr Havnar Róðrarfelag at vinna.

Formaðurin í Havnar Róðrarfelag, Óli Svein Hansen, var sera fegin um úrslitið hjá teimum báðum 5-mannaførunum.

- Ja, eg eri ótrúliga væl nøgdur við avrikini hjá Sílinum á Fjarðastevnuni. Eg eri serliga yvirraskaður av dreingjunum. Teir eru mest sum eitt óskrivað blað og hava ikki so nógvar royndir. Tí vistu vit ikki heilt, hvat vit skuldu vænta av teimum. Men eg má siga, at eg eri gleðiliga yvirraskaður, sigur Óli Svein.

Tá vit spyrja um úrslitini hjá kvinnunum umborð á Sílinum, er Óli Svein tó meira avgjørdur í sínum svari.

- Kvinnurnar hava eina meir royndu manning enn dreingirnir, og tað skal ikki vera nøkur loyna, at vit høvdu sera góðar vónir til tær. Vit bæði væntaðu og vónaðu, at tær fóru at vinna meistaraheitið í ár, og tað sær jú eisini gott út nú, sigur hann.

### - Gott at tey ungu vísa vegin

Óli Svein heldur eisini, at úrslitini hjá teimum báðum ungu manningunum hjá Havnar Róðrarfelag hava sera stóran týdning fyri felagið.

- Man kann ikki blíva við at draga teir eldru rógvararnar inn aftur í kappróðurin, og tí er gott, at tey ungu vísa vegin, sum báðar